# Tað er neyðugt at koma á fund við tíðindadeildina

Stýrið fyri Kringvarp Føroya
Att: Rúni Heinesen,
formaður

Tíðindadeildin í Kringvarpinum fekk mikudagin 13. januar svar frá stýrisformanninum, Rúna Heinesen. Í stuttum er svarið, at stýrið havnar ynski okkara um at fáa í lag ein fund við stýrisformannin. Vit á tíðindadeildini hava tó framvegis ta fatan, at tað er týdningarmikið, at vit fáa greitt stýrinum frá okkara síðu av sakini.

Rúni Heinesen vísir í svarinum til tíðindadeildina á, at málið um játtanina til tíðindadeildina verður á skrá á fyrstkomandi stýrisfundi. Tað fegnast vit sjálvsagt um, men í kæruni til stýrisformannin um stjóran, Anniku Mittún Jacobsen, staðfestir tíðindadeildin, at stjórin hevur ikki neyðugu førleikarnar at meta um, hvussu tíðindadeildin skal rekast á ein fakliga forsvarligan hátt og í samsvari við kringvarpslógina og fjølmiðlaábyrgdarlógina.

Skal stýrið fáa eina fullfíggjaða mynd av hesum máli, mugu tit hoyra báðar partar. Kjarnin í málinum er sum kunnugt, at stjórin heldur, at til ber at halda fram við verandi framleiðslu fyri uppskotna fíggjarkarmin, meðan vit sum fakfólk staðiliga ávara ímóti hesum, tí at úrslitið verður fakliga og menniskjansliga óforsvarligt. Hoyra tit í stýrinum bert stjóran, fáa tit bert innlit í ta einu síðuna av málinum. Vandi er fyri, at stýrið og stjórin kunnu taka avgerðir, ið eru illa grundaðar og sum sostatt koma aftur um aftur. Vit á tíðindadeildini hava ilt við at skilja, at tit ikki vilja taka ímóti slíkari upplýsing.

Stýrið hevur sambært §5 í lógini um kringvarp yvirskipaðu ábyrgdina av Kringvarpinum. Tað er okkara metan, at stýrið kann bróta sínar skyldur við ikki at lurta eftir fakligu vitanini á tíðindadeildini.

Tískil halda vit tað einasta rætta vera, at stýrisformaðurin kemur á fund við tíðindadeildina í Kringvarpinum.

Rúni Heinesen vísir á í svarinum til tíðindadeildina: "…at stýrisformaðurin hevur fund við ávísar starvsfólkabólkar uttan um dagligu leiðsluna á stovninum, er ikki nøkur gongd leið og ei heldur í tráð við ásetingarnar í kringvarpslógini."

Til hetta er at siga, at starvsfólkið á tíðindadeildini er ikki bara ein ávísur starvsfólkabólkur. Starvsfólkið á tíðindadeildini er beinleiðis nevnt í lógini um kringvarp. Tað er eitt krav, at tað altíð eru tvær tíðindaeindir á stovninum og haraftrat eru journalistiskir førleikar nevndir í sambandi við starvssetanir á tíðindadeildini. Hetta eru júst somu førleikar og sakkunnleiki, sum stjórin nú velur at forkasta.

Í triðja lagi vísir Rúni Heinesen á, at tað er ein ósiður, at stýrisformaðurin fer uttan um dagligu leiðsluna. Starvsfólkið á tíðindadeildini hevur verið á fundi við Anniku Mittún Jacobsen um hesi viðurskifti. Vit hava greitt henni frá okkara sjónarmiðum, so vit hava einki at goyma. Orðaskiftið kann verða skert, um stjórin er til staðar, men um tað er eitt krav, so kunnu vit ganga við til, at Annika Mittún Jacobsen er til staðar á fundinum við stýrisformannin.

Við hesum vilja vit heita á stýrisformannin um at umhugsa støðuna einaferð enn.

**Tíðindadeildin í Kringvarpinum**

# Jødafíggindalig tekning í »aktuella horninum« í Dimmalætting

SVENNING AV LOFTI



Í samband við tíðindini at ísraelska stjórnin hevur tikið avgerð um at gera múr fram við egyptiska markinum við havnarbýin Elat og fram við markinum við Gaza, fekk hetta teknaran av »Aktuella horninum« at gera eina antijødiska tekning í Dimmalætting 12. januar. Eg átali hesa tekning og serstakliga tekstin til tekningina, sum er ein efturgjørd láturgering av niðrandi tekstinum yvir eina ta herviligastu av týningarlegum nazista, sum undir seinna heimsbardaga drópu 6 milliónir jødar, av teimum hálvonnur millión børn. Tvær ferðir havi eg vitjað Auschwitz-týningarleguna í Póllandi og kenni enn kuldagjóstur fara gjøgnum mønu og merg bert við hugsanina um hesi stræti og hesar lonir deyðans.

**Láturgeran stríði Ísraels ímóti yvirgangi**
Ein slík tekning er eisini láturgeran av stríði Ísraels ímóti yvirgangi og sjálvmorðsbumbufólki, sum islamistar royna at senda inn um landamark Ísraels – einans fyri at drepa tey, ið fyri eru. Múrurin, sum ísraelsmenn hava kent seg noyddar at byggja, og nú fara at gera við Reyðahavsstrond Elats og við Gaza, er einans fyri at verja sínar borgarar. Júst hesin múrur, sum bygdur er við Judea og Samaria, hevur víst seg at vera ein sera virkin forðan av yvirgangsatsóknum inn í Ísrael.

**Vildu drepa blaðteknaran hjá danska blaðnum »Jyllandsposten« við øks**
Undirteksturin í tekningini, at Ísrael við hesum múri avbyrgir seg frá umheiminum er leyst tos og hevur einki við veruleikan av gera. Ísrael avbyrgir seg frá yvirgangsfólki og heilavaskaðum islamistum, sum teimum, ið rændu flogførini í Amerika í 2001 og rendu tey inn í høgu bygningarnar í New York og drópu 3000 sakleys fólk við køldum blóði, og hvørs drápslið reika kring heimin at drepa so mong ósek sum gjørligt, og sum herfyri vildu drepa blaðteknaran hjá danska blaðnum »Jyllandsposten« við øks.

**Ferðafólk kenna seg tryggari í Ísrael enn øðrum londum í miðeystri**
Einki annað land er so opið mótvegis útheiminum sum Ísrael, sum hevur samvinnu við øll heimsins lond. Ísrael er helst heimsins fremsti framleiðari og útflytari av framkomnari tøkni til allan heimin, umframt alt tað, ið hevur við landbúnaðarframleiðslu og nógv annað at gera. Fá onnur lond taka árliga ímóti so nógvum milliónum av ferðafólki sum Ísrael, og vit ferðafólk kenna okkum tryggari í Ísrael enn í nøkrum øðrum landi í heiminum, júst vegna átøk síni móti yvirgangi.

**Ísrael millum tey fyrstu londini at senda hjálp til Haiti**
Sama dag, sum jarðskjálvtin var í Haiti, sendi Ísrael eitt úrvalslið av 200 bjargingar- og hjálparfólki við 64 av heimsins fremstu læknum, sjúkrarøktarfrøðingum og serfrøðingum í bjargingartøkni til hetta vanlukkustadda landið. Hesi settu eftir eini løtu upp eitt sjúkrahús, ið kundi taka 500 særd til viðgerðar. Samstundis hevur Ísrael fluttin hópin av mati og aðrar neyðsynjarútgerð til Haiti. Mánadagin frættist av Haiti, at ísraelska hjálparliðið hendan dagin hevði bjargað 8 lesandi úr toftunum av einum niðurrapaðum skúla.

**Ísraelskir tónleikarar í heimsflokki í Norðurlandahúsinum**
Í seinastu viku vóru trý tónleikafólk úr Ísrael og framførdu tónleik ymsastaðni kring landið. Eg var í Norðurlandahúsinum og lurtaði eftir hesum úrmælingum. Ongantíð í lívi mínum havi eg hoyrt so vakurt framførdan klaver-, cello-, og fióltónleik. Tað var eins og eitt stórt orkestur, ið fylti Norðurlandahúsið upp í tróðrið og út í hvørja sprungu úti undir vaðingini. Vit áhoyrarar sótu sum negldir í gólvið og bergtiknir inn at sálini.

Hesir jødisku tónleikaúrmælingar vóru russiskir jødar, ið vóru komnir til Ísrael fyrst í 1990-unum – tríggir av eini heilari millión av jødum, sum eru fluttir úr fyrrverandi Sovjettsamveldinum seinastu 20 árini – og sum Ísrael hevur tikið ímóti við opnum ørmum og opnum landamørkum. Nei, Ísrael avbyrgir seg ikki, men er eitt fyrimyndarliga opið land – einasta veruliga opna landið í Miðeystri.

Um skemtiteknarin hjá Dimmalætting bert hevði havt sovið eina nátt í suðurísraelska býnum Sderot, har islamisku Hamas-rekettirnar hava regnað oman yvir býin í mong ár til dagin í dag, hevði hann neyvan teknað hesa tekning.

Hann kann tekna niðrandi tekningar um Ísrael, uttan at tað fær avleiðingar fyri hann ella húsfólk hansara, men hevði hann teknað eina líknandi tekning um profetin Mohammed, veit allur heimurin, hvørjar avleiðingar hetta hevði fingið.

# Ternan: Fyribilsloysn til Nólsoyar og eykaskip til aðrar leiðir?

JÁKUP AV SKARÐI



Hvør man ætlanin verða við farleiðini um Nólsoyarfjørð? Skal tað vera talan um eykaskip, ið verður tikið úr sigling okkara, tá ið Sam, Teistin, Smyril ella onnur skip hava teknist brek ella skulu til sýn?

Nú Ternan verður sett í stand, er vert at hava í huga at hetta er fyribilsloysn, ið SSL og landsstýrismaðurin seta í verk, soleiðis, at Strandferðslan hevur eykaskip tøkt, tá ið á stendur.

Tí er alneyðugt at arbeiða áfram við nýggjum skipi at røkja farleiðina um Nólsoyarfjørð. Skip, ið kann tryggja sambandið og skumpa undir at stig verða tikin, soleiðis at fólk støðast og soleiðis at fólk flyta til Nólsoyar. Tá krevst eisini at hugsað verður um húsasølu og húsabygging, men sambandið hevur sín avgjørda týdning óansæð um bankar veita trygd og lán at keypa/byggja hús.

Lat okkum sláa rimmar fast (ella fáa opið svar her og nú), at hetta at seta Ternuna í stand, er ikki bert fyri at nøkta tørvin um Nólsoyarfjørð. Sjálvsagt er talan um, at Strandferðslan fær sær loyvt eykaskip, samstundis sum møguleiki er at selja Ternuna, um onkur liggur framvið - men so stendur felagið við ongum eykaskipið. Tað er sjálvsagt, at hetta at seta Ternuna í stand er røtt avgerð: Strandferðslan má hava eykaskip at seta inn fyri Sam og Teistan, og tað eykaskipið skal ikki verða álitið um Nólsoyarfjørð!

Hetta at flyta eina manning av Teistanum umborð á Ternuna, er ikki fyri at betra um farleiðina um Nólsoyarfjørð - men tað er betri at seta manningina á hesa farleið, enn at siga teir úr starvi. Hvør veit, kanska finnur SSL eina "felags manningaræltan"?

Sjálvsagt ynskja nólsoyingar at fáa møguleikan at taka bilin við sær, eins væl og møguleiki skal vera at flyta farm og byggitilfar til Nólsoyar. Tunga takið at flyta líkbil og sjúk er sjálvsagt eisini avgerandi. Men taka vit orkuprát og rusksavning, so er hetta eisini lutur, ið kann og skal loysast, tá ið nøktandi skip røkir farleiðina.

Alt í alt, er avgerandi, at farleiðin er tryggjað við møguleikanum at flyta lítlan, stóran og tungan farm um fjørðin - á hjólum. Hetta verður avgerðin, ið saman við møguleikanum at endurskoða ferðaætlanina, verður grundarlagið fyri framhaldandi trivnaði í oynni.

Nólsoy hevur sítt romantiska og bleyta umhvørvið at bjóða øllum vitjandi. Men samstundis skal Nólsoy eisini bjóða nólsoyingum og tilflytarum møguleikar og avbjóðingar, ið hóska tíðini til. Eitt er at ganga við trillibøru í bygdini, men tað skal eisini verða møguleiki at taka bil til bygdina.. Nú er "bert" eftir at fáa skil á hvar bilarnir skulu verða, so bygdasliga, romantiska og barnavinaliga umhvørvið verður skatt minst møguligt.

Lat hesa áheitan verða opna og beinleiðis til landstýrismannin: Bygg skip til farleiðina um Nólsoyarfjørð, soleiðis at vit menna skipabygging, know-how, og møguleikan at byggja á kunnleikan føroyskir veitara hava ment sær í mong ár.

Lat eisini hesa áheitan verða á landsins kosnu kvinnur og menn: Bygg skip til farleiðina um Nólsoyarfjør, soleiðis at tit seta tykkara fingramerki á framburð, vitan og menning - Føroyum at frama! At seta verkætlan í gongd á 2x20 mió. er neyðugt fyri at tryggja framgongd í skipabygging og at tryggja nøkrum arbeiðsplássum.

Góðu fólkavaldu! Stuðli framburði og trivnaði í Nólsoy: Stuðli verkætlanini at byggja skip at røkja farleiðina um Nólsoyarfjørð!

Við ynskjum um dagførda og trygga farleið.